gult cyan magenta svart

Frá trølsligum dreymum og afturgingnari tí›

Erling Poulsen, rithøvundur. Mynd: Jens Kristian Vang

Carl Jóhan Jensen

»Meira millum himmal og jør›«
Erling Poulsen
Myndir: Edvard Fuglø
Bókadeild Føroya Lærarafelags
2000

UMMÆLI: N‡liga gav bókadeildin hjá Føroya Lærarafelag út bókina Meiri millum himmal og jør› eftir Erling Poulsen. Bókin er eitt framhald av ella ískoyti til bókina Mangt er millum himmal og jør› (1995), i› høvundurin og Torkil Beder, prestur, skriva›u saman. Evni› í bókini er, sum tittilin bendir á, ta› yvirnatúrliga, t.e. løgnir tilbur›ir, i› fólki hevur veri› fyri, og fyribrigdi, i› eru so undarlig, at vanligt skil illa fær útgreint tey vi› grundarlagi í lógum alisfrø›innar og ø›rum vísindaligum regluger›um og fyriskipanum.

Bókin er tó ikki ein ritger›, i› hevur ta› yvirnátúrliga fyri í sínum fjølbroyttu og skiftandi myndum í roynd sum í søgn, men eitt savn av søgum, i› høvundurin hevur savna› frá heimildarfólki og væntandi ritsjórna› og greitt til prentingar. Heimildarfólkini, sum í flestu førum eru nevnd vi› navni, hava anna›hvørt sjálvi uppliva› ta›, i› tey fortelja, ella hava frásagnir sínar frá næstingum, eitt nú foreldrum, og fólki, sum tey hava kent. Einstakar søgur í bókini hava á›ur sta›i› á prenti í blø›unum t.d. í Vi›skeranum (gamla vikuskiftisískoytinum hjá Dimmalætting) og onkur er skriva› upp eftir fólki, i› útvarpi› hevur gjørt samrø›ur vi›.

Ilt er at siga, hvussu og í hvønn mun høvundurin (um ta› er rætt at brúka ta› or›i í hesum vi›fangi) hevur tillaga› frásagnirnar hjá heimildarfólkunum málsliga, men ta› man ikki vera heilt einki, hugsi eg, tí máli› og málbur›urin er javnt og samt tann sami út ígjøgnum bókina, hva›ani i› heimildafólkini so eru, antin tey eru úr Nor›ur Oyggjum ella sunnan úr Sumba. Men gaman í, ta› er gott mál og yvirhøvur so miki› li›iligt og munnrætt, at ímyndin av tala›um máli var›veitist. Hinvegin hev›i ta› nú veri› áhugaverdari og rættari, um heimildarfólkini sluppu fram at vi› sínum egnu máley›kennum.

Søgurnar í bókini eru skipa›ar eftir evni, men ikki eftir nakrari ávísari tí›arrø›, solei›is at tær elstu søgurnar t.d. standa fyrstar og so upp eftir. Erling Poulsen fylgir í stórum dráttum teirri ritsjórnarhevd, i› hevur veri› algongd í sambandi vi› slíkar útgávur, eitt nú í Íslandi, har bøkur av hesum slag leingi hava veri› og enn eru sera væl umtóktar.

Hvørji eru so søguevnini?

Sum heild er evni› í søgunum sovor›i›, sum hvørt mansbarn man kenna frammanundan, tí nógv ta› mesta av tí er so ella so komi› fyri almennings eygu ella oyru í onkrum líki á›ur. Her er sagt frá fyribrigdum, sum longu stó›u fullskapa› í føroyskum teksti og tilviti›, tá i› øldin, sum nú er um at renna á enda, enn var n‡komin t.e. fyribrigdi, sum eru l‡st í sagnum og søgum, bæ›i á mannamunni og á prenti, alt sí›ani Hammershaimb og Jákup doktari Jakobsen vóru á døgum. Her eru t.d. frásagnir um fyribo›anir (ella varsil), um feigd, um sanndroymi, um duldar kreftir, sum hjálpa fólki í ney›stø›u, um afturgongur, um dey›, sum vita aftur í ver›ina, um huldufólk, um at síggja í hamfer› o.s.frv. o.s.frv. Frásagnirnar leggja sum so líti› aftur at hevdini, haldi eg, tó einstøk undantøk eru.

E. Poulsen hevur skilliga sett sær tann fyrisetning at savna søgur vi› denti á si›søguliga vir›i teirra. Hetta hevur vi› sær, at frásagnirnar eru afturlítandi, tí›um at tí marki at tær kennast samtí›arskíggjandi. Hinvegin eru tær so kanska av somu grund í sambæriligari vi› ta uppfatan av føroyskari mentan, føroyskari søgu og føroyskum sjálvstilviti›, sum tvístø›an millum tjó›skap og heimast‡ri skapt og nørdi afturat.

Samanbera vit hetta savni› vi› samsvarandi søvn, eitt nú í Íslandi, har i› umstø›urnar í mongum eru átøkar okkara egnu, tá i› um fólkatrúgv ræ›ur, og líkna vit somulei›is hesar frásagnirnar vi› ta› rættiliga stóra tilfar, sum er savna› av mannamunni í Føroyum (men ongantí› er komi› á prent), sæst, at í Meiri millum himmal og jør› vil bæ›i eitt og anna› detta burtur ímillum, i› annars sermerkir søgur, i› leita sær evnisfang handan fyri ta›, sum vit og skil kann fata.

Nógv tær flestu søgurnar í bókini hava stø›i í teirri lívssko›an, sum helt føroyska samfelagnum saman í fyrra parti av øldini. Teirri lívssko›an, sum gjørdi áliti› á eina óbroytiliga og altøka yvirvøld her sum handan til tann klett, i› fólki› bygdi sína andligu og yrkisligu mentan á í eini tí›, tá i› sluppfiskiskapur og trø›in vóru haldi› í føroyska samfelagsbúskapinum.

Søgurnar, i› t.d. siga frá vanlukkum og ø›rum tilbur›um á havinum, hvíla solei›is á kristiliga snara›um hugtøkum sum lagna, forsjón, feigd o.s.frv. Fleiri søgur hava eitt undirskilt si›aligt (ella moralskt) innihald, sum er tvinna› saman vi› tann hugbur› og ta› sinnalag, sum slík hugtøk l‡sa, eitt nú søgan um mammuna, i› gav soninum bo›, tá i› hon doy›i (bls. 48) og søgan um altarljósini, sum slókna›u í kirkjuni framman undan, at onkur doy›i (bls. 78).

Í ø›rum søgum er tann si›aligi bo›skapurin afturímóti opinl‡sur eitt nú í søguni um eingilin, i› vardi smádreingin (bls. 108), og í søguni um tann dey›a pápan, sum vardi dótturina fyri manninum, i› vildi buka hana (bls. 161) (hesar søgurnar kundu saktans veri› tiknar beint upp úr Sunnudagsbla›num). Eisini kunnu summar av søgunum í bókini lesast sum trúarligar dømisøgur, eitt nú frásøgnin um ljósi›, sum vísti kommunulæknanum Vamborg veg um Hvalbiarfjall eina náttina í bølamyrkri. Onkrar av søgunum hava har umframt eina politiska helling, i› man taka seg eitt sindur fjákuta út fyri flestum nú á døgum, eitt nú søgan um kirkjuklokkuna á Kirkju úti í Fugloy, i› fór at ringja av sær sjálvari, tá i› Kristian kongur X anda›ist 20. apríl 1947 (bls. 80). Sum vituligt er í eini bók um ta› yvirnatúrliga, er dey›in grundtónin í at kalla øllum søgunum. Men stø›an til dey›an, hugbur›urin, er tó eftir ø›rum í hesi bók. Dey›in birtist ongantí› ø›rvísi enn í fullum samsvari vi› ta›, i› prestar og lestrarbøkur hava lært ættarli› av føroyingum. Hann er uttan undantak kristiliga útlagdur sum ja›arin ella marki› millum ta› jar›liga og yvirjar›liga lívi›.

Í savningararbei›i sínum eltir Erling Poulsen, sum longu nevnt, eins og fyri er sló›a› av teimum, i› undan honum hava savna› og givi› út frásagnir av mannamunni í Føroyum hesi seinastu hálvtanna›hundra› árini ella so. Tíverri hevur hann ikki bert tiki› eftir tí, sum gott var og væl gjørt hjá slíkum hegnismonnum á økinum sum Hammershaimb og Jákup Jakobsen, nei, hann tekur eisini teirra avmarkingar, teirra borgarligu smakkvísi og fordómar til sín. Hann hevur skilliga brúkt teirra meiri enn hundra› ára gamla mát fyri, hvat i› savningarvert er og prentbært.

Hetta er eftir míni hugsan meginveikleikin í bókini og ger hana óáhugaverda bæ›i bókmentaliga og sum heimild um føroyska fólkatrúgv bæ›i í gamlari og (upp á seg) n‡ggjari tí›.

T. d. eru ongar søgur tiknar vi›, i› á nakran hátt bera at tí sambandi, sum er millum ta› kynsliga og ta› yvirnatúrliga. Ta› er tó ey›kent fyri mangar frásagnir av hesum slag, at tær nettupp snara ta› kynsliga og gátuføra saman. Í íslendskari hevd er søgan um deknin vi› Myrká, i› vildi lokka unnustu sína Gu›rún til sín í grøvina eitt gott dømi. Í føroyskari hevd er hetta evni› m.a. tiki› upp í vísuni Riddarin Klæmint (CCF 145), i› sigur frá frúnni Medallín, i› skuldi fáa “hug at dey›um manni”. Ymisk tilbrigdi vi› hetta tema síggjast eisini aftur í søgum, i› eru uppskriva›ar ella tiknar upp á band frá heimildarfólki í Føroyum tey seinastu hálvtr‡ss árini. Ey›kend dømi eru frásagnir um samskifti millum fólk og fornisk (t.d. søgan um sandingin, i› fríggja›i vi› einari huldugentu úr Dímun). Somulei›is fáa ongar søgur innivist í bókini, sum taka ta› myrka og demoniska fram í mannasálini, søgur um ólagaligar átrongdir, devulskap og teir óve›ursillandar, sum mótsettar kreftir villa upp í syndigum kroppum og sálum. Sama er galdandi fyri søgur, i› gera seg inn á tey bo› og bann, sum hevd og ótti hava sett í samfelagnum. Søgur sum eitt nú tann minniliga søgan, i› Maria Skylv Hansen fortelur í Gomlum gøtum II (bls. 123), um prestskonuna, i› ikki vildi eiga børn og fekk yvirnatúrlig rá› til til at sleppa undan. Ongar søgur eru heldur valdar í bókina, har i› dey›in er tann ósvitaliga endastundin ella marki› millum lív og ta› ólív, sum vit finna eitt nú í íslendskum sagnum um dreygar (t.e. livandi lík), mangan vi› opinberligum kynsligum (eisini samkyndum) undirtónum.

Samanumtiki› er hetta ein bók, sum óiva› fer at selja væl og hvørva sum matur av bor›i úr bókabú›unum. Tí, ta› skerst ikki burtur, at í hesum tekstunum sæst sum í einum spegli, einum spegli, sum er íbygt av einum anda, i› ikki letur ta› spegla meiri enn eyga›, i› sær, vil síggja. Og ta› er av sonnum ein andi, i› samtykkir væl vi› ta serligu hugsku, sum føroyska samfelagi› hevur til at kví›a seg vi› og ræ›ast samtí› sína. Ein andi, sum beinanvegin gessar trongdina upp til í heilum at kóla aftur um ta› farandi at vita um fortí›in (helst í einum so forhugna›um skapilsi sum gjørligt) ikki onkursvegna man vera afturtøk kortini – í huga sum í roynd.

Ta› er sjálvandi vir›ingarvert, at onkur tekur upp á seg at savna og geva út frásagnir av mannamunni bæ›i um yvirnatúrlig og onnur evni. Eingin ivi um ta›. Men álvaratos hevur munnlig frásagnarlist í Føroyum ikki anna› og meiri at bjó›a, eg spyrji bara, enn hetta afturá-í-sofuni-so-kristiliga-kuldakropi›, hetta ósmædna lifri› fyri tí lyndinum í okkum, sum helst vil vera óvitandi um, at grundirnar rembast undir mentan okkara, ja, ger seg blint fyri teimum miklu skjálvtum, sum ganga gjøgnum samfelagi› og leggja ta› opi› fyri einari framtí›, i› hvørki vir›ir ótta okkara ella stúran (og tíansheldur heimast‡rislógina)?

Eg ivist.

E.S. Eitt hjartasuff: Kann forlagi› ikki síggja til, at bøkur av hesum slag ver›a útgjørdar vi› einum n‡tiligum innihalds- og evnisor›ayvirliti›?

Intensiv bló›roynd



UMMÆLI. Úr rey›um myrkri starir eyga› høvundans illbo›andi uppá nøtrandi lesaran. Uppsetingin er hugtakandi og gevur permuni ein dám av nútí›, av pulsi og av intensari nærveru

Kinna Poulsen

Tóroddur Poulsen
»Bló›royndir«
Perma: Ova
Mentunargrunnur Studentafelagsins 2000

Bókin kom bóltandi inn um hur›ina í á›ni og small so hart í gólvi›, at eg vakna›i. Skelkin fekk eg aftaná morgunmatin, tá brævbjálvin var› upplatin og bókaperman opinbera›i seg. Ógvuslig or› kanska, men ney›ug í hesum føri fyri at l‡sa ta› bestu permuna á nakrari føroyskari bók í ár. Úr rey›um myrkri starir eyga› høvundans illbo›andi uppá nøtrandi lesaran. Uppsetingin er hugtakandi og gevur permuni ein dám av nútí›, av pulsi og av intensari nærveru. Og so er ta› ikki minni fantastiskt endiliga at uppliva eina bók, har perman hevur naka› vi› innihaldi› at gera, at hon beinlei›is er tengd at innihaldinum og ikki bara er ein ella onnur hálvabstrakt mynd sum hongur í leysari luft, tí hon er klamsa› á eina permu til pynt. Solei›is er ta› ikki vi› permunum hjá Tóroddi Poulsen. Onkur teirra hevur veri› heilt væleydna›, t.d. perman á hansara Speispei spei frá í fjør. Henni stó› Ova fyri og ta› er aftur nú Ova, sum eigur hei›urin av hesari. Flott!

Bló›royndir eitur savni›; eitt saftigt og fruktagott heiti› eisini av tí, at ta› gevur hugasamband til fleiri or›. Fyrst til tann t‡dning, sum ver›ur brúktur dagliga úti á sjúkhúsinum, ein bló›roynd, sum kann n‡tast til at sta›festa hvat sjúklinginum bagir. Or›i› ritroyndir kemur til hugs; essay skriva› vi› egnum bló›i. Patetiskt ? Hví ikki! Sambandi› millum bló› og blekk kemur til sjóndar í einum broti av vøkru yrkingini hjá Bergliot Heinesen, Scherzo, sum er sett sum inngangsvers til Bló›royndir. Í fyrstu yrkingini vera vit bo›in vælkomin at leggja okkum á grasi og siga summardáunum eina gó›a. Hetta er gott og heimligt stø›i á fer›ini inn í savni›, sum telur 84 yrkingar, harav eini 23 haiku (t.e. japanskur yrkingarháttur uttan rím, har hvør yrking hevur 17 stavilsir sum eru fordeild vi› ávikavíst fimm, sjey og fimm stavilsum) og 5 tanka (tá tvær reglur vi› sjey stavilsum í hvørjari ver›a lagdar aftrat einum haiku, kallast ta› tanka). Men ta› sn‡r seg um anna› enn matematikk; eitt haiku skal úttrykkja eitt hugskot ella eina kenslu vi› so fáum or›um sum møguligt eins og t.d. hendan:

Myrkri› dandar á
eygnalokunum: barni›
hvørvur í ljósi›.

Yrkingarsavni› Bló›royndir inniheldur fleiri tílíkar perlur, t.d. Tann hugsa›a áin og Bleikt minni, sum gav mær gásahold, i› enn ikki hevur lagt seg heilt. Yrkjarin er umhugsin; jólini nærkast og tí er eitt uppskot til jóladøgver›an komi› vi›:

Fyll dunnuna vi›
bókmentasøgunnar før-
oysku beinagrind.

Gjøgnumgangandi tónin er eitt sindur melankolskur - Nick Caveskur – men hvørki spei ella sjálvspei hava mist biti›. Hendan er eitt fitt dømi uppá mótsøgnina millum ta› stóra og ta› smáa; millum hátí› og tvætl (skvatl) millum filosofi og gerandisdag, sum spælir sær í yrkingunum.

Beint tá
hann skuldi seta seg
ni›ur at skriva
um tann stóra t‡dningin
ta› hevur fyri
heimspekina
at sita í dagar
ja vikur
og gløa út í tóman heim
ba› hon hann fara oman
at keypa mjólk og brey›
og taka ruskposan vi›.

Hendan er jú løtt at skilja. A›rar av yrkingunum skulu nokk koma út fyri onkrum, sum blakar tær frá sær og kallar tær óskilligt skrambul. Mann skal ikki vera bangin fyri at vi›ganga, at mann ikki skilir eina yrking. Ta› er í lagi vi› henni... Ta› besta er í grundini, tá mann ikki skilir alt beinanvegin. Tú lesur nøkur or›, sum ikki tykjast hanga logiskt saman. Or›, sum heldur goyma enn at avdúka, men ta› er sjálv fer›in yvir í móti fatanini, sum jú er tann stóra upplivingin. So í sta›in fyri at vísa ta› frá sær, kann mann ste›ga á og kanska bara smakka uppá eitt or›. Kunsturin er at fáa somu kensluna fram, sum tú hev›i, tá tú vart lítil og tr‡sti hendurnar at eygunum fyri at síggja stjørnur innan fyri eygnalokini. Ella tá tú snara›i runt og runt fyri at gerast í ørviti.

Mær væntar eitt l‡singaror›, sum stutt og greitt kann l‡sa mína gle›i yvir hesa bókina, men eg finni einki føroykst. Hugdi í or›abókina undir “formidabel” og har stó› “ófør” (huff), men ta› skal ikki for›a mær í at vi›mæla Bló›royndir! Hetta er næsta bókin hjá Tóroddi í ár. Ætlar hann at halda dampinum komandi árini - tí hevur Statens Kunstfond givi› honum møguleika fyri – so hava vit nógv spennandi upplivilsi í væntu.

Shaft í Havn

SVART GULL. Blaxploitation filmurin ”Shaft” frá 1971 kemur nú í n‡ggjum sni›i. Samuel L. Jackson er n‡ggi ”Shaft”, men soultónleikurin er enn hin sami vi› Isaac Hayes

Birgir Kruse

Fyrst í sjeytiárunum kom fram ein egin rørsla millum svørt filmsfólk. Í har›rendum amerikanskum stórb‡arumhvørvi l‡stu tey kriminell vi›urskifti. Altí› var banditturin hvítur og altí› var hetjan svørt. Og dullan í hesum svarta umhvørvi, hon var hvít. Og hin svarta hetjan fær hana. Afturvi› tí›arrøttum svørtum tónleiki. Eitt slag av ”takk fyri sí›st” filmum, har hvítir pengar oftast flyta fólki›.

Hetjan er ma›ur og dullan er kvinna. Samstundis sum henda svarta mannliga hetjumynd ver›ur hevja› hátt, er kvinnan bert pr‡›islutur. Millum vælklæddar svartar menn í tí›arrøttum klædningum og tjúkkum gullketum. Ein macho-stílur, har lyklaor›ini eru supercool og supersexy.

Blaxploitation var› henda stuttlíva›a eskapada í svørtu undirver›ini rópt í sjeytiárunum. Millum kendastu filmar av hesum slagi eru ”Sweet sweetback”, ”Superfly”, ”Foxy Brown” – og ”Shaft” frá 1971.

Nú er høvi› at síggja henda skjótt 30 ára gamla film í n‡ggjari útgávu. Høvu›sleiklutin hevur Samuel L. Jackson, vit kenna úr ”Pulp Fiction” og gamli, upprunaligi Shaft, Richard Roundtree, hevur eisini ein lítlan leiklut í hesum n‡ggja filmi. Ey›kennistónleikurin er óbroyttur – ta› er hin nú 62 ára gamli Isaac Hayes, eisini nevndur Black Moses, i› letur hann. Vir›islønta tónleikin, sum í 1971 vann Oscarvir›isløn. Hayes er í dag vor›in kendur í filminum og sjónvarpsrø›ini ”South Park”, har hann er kokkurin Chef vi› teim ivasomu meiningunum og djúpu røddini. Supercool og supersexy, dude. Dagførdi ”Shaft” filmurin var› frums‡ndur í Havnar Bio fríggjakvøldi›.